T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

## Varaleiðari og pedagogur

Vegna farloyvi verður søkt eftir varaleiðara til Útistovuna á Hvítanesi at byrja 1. juli 2002.

Eisini verður søkt eftir einum pedagogi at byrja 1.juli 2002. Bæði størvini eru 35 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Útistovan á Hvítanesi er knýtt at býlingshúsinum Inni á Gøtu og skal nýtast, sum ein øðrvísi avbjóðing hjá børnunum á dagstovninum.

Í Útistovuni á Hvítanesi ganga 16 børn í aldrinum 5-7 ár.

Vit halda til í sera hugnaligum umhvørvi í gamla skúla á Hvítanesi.

**Vit ynskja**
- at tú ert førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- at tú saman við okkum megnar at skapa eitt gott umhvørvi fyri foreldur, børn og starvsfelagar
- at tær dámar væl at vera úti saman við børnunum

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Poulu Eidesgaard, leiðara, á tlf. 317701 ella Katrina Petersen, samskipara, á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum Inni á Gøtu, Ovaragøta 30 B, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi 15. Juni 2002.

S N A R S K I V A N

## Felagsskúlin á Oyrabakka

Søkt verður eftir lærara skúlaárið 2002/2003 fyri lærara, sum hevur farloyvi.

Lærugreinir: støddfrøði, alis-/evnafrøði, enskt og søga/samtíð í framhaldsdeildini.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu sendast til Felagsskúlan á Oyrabakka í seinasta lagi 31. mai 2002.

Nærri fæst at vita hjá skúlastjóranum tlf. 422084 ella tlf. 423098.

**Felagsskúlin á Oyrabakka**
FO-450 Oyrabakki

## Leirvíkar Skúli

### Søkt verður eftir lærara
**til tíðaravmarkað starv við Leirvíkar Skúla skúlaárið 2002/2003.**

- 1 lærari at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 og 27.4.

Meira fæst at vita um starvið frá fyrstalæraranum á tlf. 443234 ella 213625.

Umsóknir skulu vera Skúlastýrinum fyri Leirvíkar Skúla í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 31. mai 2002.

**Skúlastýrið fyri Leirvíkar Skúla**
**Att.: Jákup Tróndheim**
**520 Leirvík**

## Starv sum sjómansskúlalærari

Søkt verður eftir lærara til Føroya Sjómansskúli frá 1. august 2002.

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt spennandi starv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um karmar og samstarv ímillum leiðslu, lærarar og næmingar.

**Førleikakrøv:**
- Hóskandi útbúgving
- Helst hava undirvíst áður
- Kunna undirvísa í náttúrulæru, el-læru, skipstøkni og enskum
- Hava góðar samstarvseginleikar
- Hava góðar royndir innan teld

**Setanarviðurskifti:**
- Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Fakfelag Sjómansskúlalærara

Umsóknir skulu sendast til Føroya Sjómansskúla, Nóatún 2, Postboks 104, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 3. juni 2002.

**Føroya Sjómansskúli**

mazda

## Fólk søkist

Søkt verður eftir royndum fólki til persónbilaverkstaðið, at byrja beinanvegin.

**BERG MOTORS**
**Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35**

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 18. mai 2002, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Pure Water í Klaksvík**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dago.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 18. mai 2002, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Bakkafrost**
**á Glyvrum**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dago.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

## Fuglafjarðar skúli

Søkt verður eftir 5 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/2003. Størvini eru til fulla tímatalvu.

Størvini eru fyri 2 lærarar í farloyvi, 2 lærarar við ráðgeving og lærarar við lækkaðum tímatali.

Størvini verða lønt samb. avtalu millu Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Møguligar umsóknir skulu latast skúlastýrinum í seinasta lagi **mikudagin 29. mai kl. 12.00**

**Skúlastýrið f. Fuglafjarðar skúla**
Uni Næs, formaður
FO-530 Fuglafjørður



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**



## søkir eftir fólki til eindina »Verkstaði«

**Einum fólki til »klæðna- og sniðverkstaði«**
**Vit síggja fegin at tú kanst**
- Framleiða ymiskar lutir. Tað verið seg seyming, binding, veving, gips- og glasstoyping v.m.

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
- At læra brúkarin eitthvørt handverk sum kann seljast, og vera við til at geva gerandisdegnum innihald.
- At verða við til at byggja upp arbeiði á deildini. Talan kann vera um at arbeiða á øðrum eindum.

**Førleikakrøv**
- Viðkomandi útbúgving
- Evnir at læra av sær
- Evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar
- Dugur at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- Ert hugskotsfullur, kreaktivur og positivur

**Vit bjóða**
- Spennandi uppbyggingar arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan
- Skeið møguleikar

**Løn og setanartreytir**
- Starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran
- Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið
- Størvini verða at seta 1. august 2002, ella skjótast tilber

Meira fæst at vita um starvi við at venda sær til Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2002**

Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Smiðjugerð 6, kj
Postboks 301
110 Tórshavn **brævbjálvin skal viðmerkjast: »umsókn verkstaður«**

**»Verkstaður«**
*Endamáli við hesi eindini er at geva arbeiðstarnaðum fólki, sum ikki hava útlit til at klára seg á vanliga arbeiðsmarknaðinum, men sum hava tørv á at vera dagliga virkin á ein hvønn hátt, møguleika fyri at upplærast til at útinna t.d. lættari handverk.*

**P/F ALMA** *Maskinverkstaður & Smiðja*

**Caterpillar gravimaskinur í øllum støddum**

CAT



**P/F ALMA**
**á Hjalla 15**
**P.O. Box 1338**
**FO-110 Tórshavn**
**Tel. 315 890**
**Fax 313 500**
**E-mail: alma@alma.fo**
**www.alma.fo**

**Caterpillar umboðið í Føroyum**

CAT MaK GROVE worldwide Atlas Copco Munters BUCHER

## Aðalskrivari í Føroya Ungdómsráð

Leitar tú eftir avbjóðingum og einum spennandi starvi, so kann hetta vera júst starvið, tú leitar eftir. Føroya Ungdómsráð, sum er felagsskapur fyri skipaðu barna- og ungdómsfelagsskapirnar í Føroyum, søkir eftir aðalskrivara fulla arbeiðstíð.

**Í starvinum skalt tú:**

- Røkja dagliga virksemi felagsins
- Samskifta við øll viðkomandi
- Gera vanligar skrivstovuuppgávur
- Virka sum skrivari
- Samskipa tiltøk í Føroyum og í Norðurlondum
- Halda heimasíðuna við líka og senda tíðindaskriv út, tá tørvur er á tí

**Vit vænta at tú:**

- Hevur royndir innan barna og/ella ungdómsarbeiði
- Ert røkin og fyrikomandi
- Ert dugnalig/ur at samskifta og samskipa
- Dugir væl at skriva føroyskt
- Dugir at tosa og skriva á norðurlendskum
- Fyrimunur er, um tú eisini tosar og skrivar enskt.
- Dugir at nýta teldu á brúkarastigi.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og eisini skalt tú verða sinnað/ur at fara av landinum í arbeiðsørindum.
Tú kanst fáa meira at vita um starvið við at venda tær til Andreu Eldevig á tlf 218108.

*Umsóknir saman við møguligum viðmælum og prógvum, skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 27. mai 2002.*

**Føroya Ungdómsráð**
**Tinghúsvegur 18, 4h.**
**110 Tórshavn**

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

## Dagrøktarar til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir dagrøktarum.

**Tórshavnar kommuna bjóðar**
Sum dagrøktari í Tórshavnar kommunu fært tú eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv og hollan stuðul frá kommunalu skipanini.

Fyri at hava børn í dagrøkt er neyðugt, at hølini, har børnini verða ansað, eru egnað, og at møguleikar eru fyri uttandura virksemi.

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála við Starvsmannafelagið. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðsla í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, leiðara, tlf. 315160.

**Umsóknir**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til: Tórshavnar kommunu, Dagrøktarskrivstovan, Kirkjuvegur 1, 100 Tórshavn.

S N A R S K I V A N